# Hanus og Stanley fyltu Miðlahúsið

**Hanus G. Johansen og Stanley Samuelsen spældu í Miðlahúsinum ólavsøkudag klokkan 18, og hetta savnaði so nógv fólk, sum ongantíð áður i húsinum, og teir báðir livdu lættliga upp til tann heiður, sum Miðlahúsið fyrr á degnum hevði latið teimum við Listavirðisløn Miðlahúsins**

ÓLAVSØKA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



*Stanley og Hanus fyltu Miðlahúsið ólavsøkudag*

*(Mynd: D. Olsen)*

Ólavsøkudag fingu tveir av fremstu vísusangarum okkara Listavirðisløn Miðlahúsins á 50.000 krónur í part. Hanus G. Johansen og Stanley Samuelsen fingu hendan heiður og hesa viðurkenning, og seinni á kvøldi, klokkan 18, stóðu teir á plakatini at skula hava konsert saman í Miðlahúsinum.

At hesir báðir troubadourarnir leika við sama høvi er stórhending, og hetta vóru tað eisni mong, ið hildu, tí so nógv fólk hevði leitað sær í Miðlahúsið til konsertina, at hetta er ein hin størsta fjøld, sum hevur verið í húsinum.

Hanus og Stanley spældu fleiri av sínum perlum. Hessar vísur, ið eru fólkaogn, og saman spældu og sungu teir Blóma Mín hjá Poul F., sum Hanus hevur sett lag til.

Hanus hugtók við sínum orkumiklu tulkingum og Stanley gjørdi lurtaran enn einaferð bilsnan av frálíka guitarspælinum, sum hann megnar at leggja undir framførslurnar.

Teir báðir skuffaðu ikki tey, ið høvdu megnað at fáa sær pláss í Miðlahúsinum, ella úti í Miðlagarðinum, tí hesin tímin gjørdist eitt perluband av kendum vísum, ið tveir av fremstu vísusangarum í landinum framførdu, meðan sólin bakaði uttanfyri, men inni fór eisini heitur ylur gjøgnum lurtarafjøldina, tá løg sum t.d. »Um Eg Kundi Kvøðið« og »Blóma Mín« ljómaðu.

Lóvabrestirnir prógvaðu eisni, at hesir vísusangararnir fáa viðurkenning frá lurtarafjøldini, og tað fløvar oivað eisini hjørtu teirra, eins og meira almennar viðurkenningar gera tað.

# Ævintýrkend ævintýrferð

**Búi Dam og Dánjal á Neystabø hava við Ævintýrferðini givið børnunum eitt ógloymandi upplivilsi og eitt tónlistarligt »pappkassa-show« av aðrari verð**

LEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



*Ævintýrferðin er eitt upplivilsi í nútímans leiklist og barnsligum frælsi, so tað er ein fragd fyri bæði børn og vaksin*

*(Mynd; Dagfinn Olsen)*

Búi og Dánjal framførdu á ólavsøku Ævityrferðina, hitt fantastiska orkestrið. Hetta er í veruleikanum eitt leikslag, sum hevur verið burturgoymt ov longi, tí tað er longi ímillum leiktiltøkini, ið eru ætlað børnum, og neyvan er slíkt av álvara sæð, síðani Gríma ferðaðist kring landið. Og yvirhøvur er saknur í ferðandi leikfólki.

Men ævintýrferðin er eitt upplivilsi í nútímans leiklist og barnsligum frælsi, so tað er ein fragd fyri bæði børn og vaksin.

Teir megna at skapa ein hugaheim við leiki og sangi, tí - sum teir sjálvir siga - ein skal bara nýta »pippið«.

Og ger ein tað, so er onki ófort, og tað vóru óivað fá, ið t.d. ikki ímyndaðu sær spikafeita grísin, sum teir myndaðu í tómari luft, ella húsini hjá tarvinum, sum var so illsintur, at hann njósaði av øði.

Børnini hava ikki bert hyggjaraleiklut, men sleppa at luttaka og vegleiða og seta dám á framførsluna, og Búi og Dánjal lofta hegnisliga hugskotunum.

Men stuttligt er eisini, at tað er loyvt at siga og syngja t.d. »rumpan er reyð«, og so mangt annað, og tá munurin á gentm og drongjum var á breddanum, so vísti hetta eisini, at børnini eru við á hesum økinum. Hetta eru nýggir tónar í barnaleiki í Føroyum, men so hegnisliga gjørt í »barnahædd«, at ongin tekur sær tykni av tí.

Og sangurin, sum at enda í framførsluni verður gjørdur saman við børnunum, og sum kann hoyrast uttanfyri eftir framførsluna, er eitt virðilgt punktum fyri livandi ævintýrferðina, har børn og vaksin sleppa at royna hugflog og flyta mørk.

Hattin av fyri ferðaleiðarunum báðum undir hatti; Búa og Danjali.

# Lena og Niclas við ólavsøkuhugna

**Fitt av fólki hevði leitað sær í Miðahúsið ólavsøkuaftan fyri at hoyra Lenu og Niclas, og hetta gjørdist eisini ein hugnaløta við góðum tónleiki**

ÓLAVSØKA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Eftir ein steðg, har føroyingar ikki hava hoyrt so nógv til Lenu Andersen og Niclas Johannesen, er gott at uppliva tey bæði aftur á føroysku pallunum.

Tey hava havt nakrar framførslur um ólavsøkuna, og ólavsøkuaftan klokkan 22 framførdu tey í Miðlahúsinum.

Intimkonsert er fyrsta orðið, ið kemur til hugs, tí umframt tónleikadygd, so var hugnin í hásæti hesa løtuna við tonleiki, livandi ljósum og eini lurtarafjøld, ið heilt týðuliga neyt tónlekin.

Sum vant spældi Niclas undir, meðan Lena sang, men Lena tók eisini guitaran í hond. Vøkur løg og vøkur rødd, og so tykist tað eisini, sum spæligleðin veruliga er til staðar.

Hetta var bert eitt av mongum tiltøkum í Miðlahúsinum, tí umframt Lenu, so spældu eisini Spælimenninir og Stanley og Hanus í Miðlahúsinum ólavsøkudagarnar, men konsertin við Lenu var hin einasta, ið lá so seint á kvøldi. Og hetta riggaði væl, tí huglagið var tað rættað, har tónleikur, hugni og livandi ljós rakk hægri eind.

Ongin ivi tykist vera um, at Lena er aftur á føroyskum pallunum við spæligleði og orku, ið smittar, og tað er at fegnast um.



*Ólavsøkuaftan framførdu Lena og Niclas í Miðlahúsinum*

*(Mynd: D. Olsen)*